

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 03 - 2012

# Merkið veitrar nú á Sjóborg

Fyri løtu síðani varð Merkið vundið á stong umborð á nýggjasta farinum í føroyska flotanum, "Sjóborg" hjá Supply Service í Leirvík. Skipið varð latið nýggju eigarunum í dag á Havyard skipasmiðjuni í tí norsku Lorvíkini. Í morgin verður stór móttøka í Bergen, har nýggja skipið verður navngivið. Sjóborg er triðja skipið í snotuliga frálandaflotanum hjá Supply Service. Undan tí eru komin Eldborg og Saeborg. Og enn eitt er á veg. Tað er Tórsborg, sum verður liðugt um nakrar mánaðir. Í samrøðu við Útvarpið á middegi segði Jens Meinhard Rasmussen, stjóri, at Sjóborg er heimsins mest framkomna supplyskip. Skipið kostar 375 mill. kr. at byggja. Øll tey fýra skipini hjá Supply Service kosta 1,2 mill. kr. Sáttmáli er gjørdur við Statoil.